## Talibantalsmaður tikin

Í Swat-dalinum har norðuri í Pakistan hava pakistanskar trygdardeildir handtikið fimm leiðandi menn í Talibanrørsluni. Ein talsmaður fyri trygdardeildirnar sigur sambært BBC, at millum teir handtiknu er Muslim Khan, sum verður hildin at vera fremsti talsmaðurin hjá Taliban í Pakistan. Tann ovasta leiðslan í Taliban kunngjørdi fyri stuttum, at Muslim Khan var tilnevndur talsmaður fyri rørsluna, eftir at undanmaðurin, Maulvi Omar, bleiv tikin í Pakistan í síðsta mánað.



## Ætla fleiri einskiljingar

Vinnur tann konservativi andstøðuflokkurin næsta parlamentsvalið í Bretlandi, fer hann at einskilja fleiri av teimum størstu almennu fyritøkunum og stovnunum. Millum stovnarnar, sum kunnu koma upp á tal, eru kringvarpið BBC, postverkið Royal Mail og nakrir bankar, sum tað almenna hevur yvirtikið í sambandi við fíggjarkreppuna. Parlamentsval verður í Bretlandi í seinasta lagi næsta vár, og soleiðis sum meiningakanningarnar síggja út nú, er lítil ivi um, at tey konservativu fara at vinna á Arbeiðaraflokkinum, sum hevur sitið við ræðið í meiri enn 10 ár.

# Skúlin fatað landsroyndina

**Á pappírinum hevur Landsroyndin gjørt stór framstig. Ein orsøk er, at skúlarnir nú betur skilja, hvør ætlanin er við royndini, staðfestir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna**

LANDSROYND
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Gráturin var stórur í fjør. Næmingarnir dugdu illa at lesa, gjørdu ov lítla framgongd og serliga hjá sætta flokki var støðan í lærugreinunum, »støddfrøði« og »náttúru og tøkni«, syndarlig.

Men í ár er alt vent á høvdið. Í hvussu so er á pappírinum. Tí hóast úrslitini í støddfrøði og náttúru og tøkni ikki er so góð, sum mann hevði vilja, so er ein heilt stór framgongd gjørd í úrslitunum av hesi næstu landsroyndini.




*Úrslitið av landsroyndunum vísir, at útfrá givnu royndini, hava næmingarnir klárað seg munandi betri í ár enn í fjør*

*Tilvildarliga mynd*

### Fleiri royndir

Landsstýriskvinnan greiðir frá, at ein av mununum millum árini bæði, er, at nú kenna skúlarnir skipanina, tí í fjør var nógvur kritikkur frá skúlunum av kunningini um landsroyndirnar.

- Skúlarnir kenna betri skipanina og ætlanina við Landsroyndunum, so øll vita, hvat uppgávurnar snúgva seg um, staðfestir hon.

Spurd um næmingarnir eru dugnaligari í ár enn í fjør, sigur landsstýriskvinnan, at tað er ilt at siga.

So um næmingarnir er dugnaligari, undirvísingin betri, royndirnar gjørdar betri, stýringin á skúlunum betri ella um onkur heilt onnur orsøk ger seg galdandi, er framvegis ilt at siga.

### Gleðiboð

Tað er ein errin Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við skúlamálum, sum greiðir frá úrslitunum.

- Vit síggja, at framgongd hevur verið í lesiførleikanum, hóast tíðin til royndina er stytt, greiðir hon millum annað frá.

Tað er bara í fyrisøgn hjá fjórða flokki, at tað á pappírinum er afturgongd, og hetta verður grundgivið við, at har vóru orðini truplari hesaferð.

Men aðrir munir eru eisini. Orðingarnar í sjálvum uppgávunum eru gjørdar øðrvísi og dupult so long tíð var givin til spurningarnar í mállæru.

### Munur á fjórða og sætta

Hóast hesa stóru framgongd í heildini á kanningini, so kann ein niðurstøða gerast aftur í ár. Næmingarnir klára seg betri í fjórða flokki enn í sætta flokki í nærum um øllum royndunum.

- Tað er framvegis nakað, vit mugu arbeiða við, og tá samanhangandi námsætlanirnar verða klárar, ber betur til at samanbera. Og tá fleiri landsroyndir hava verið, so kunnu vit betri samanbera árini. Men vit mugu eisini hyggja eftir, um nakrar tillagingar skulu gerast, staðfestir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við mentamálum.

### Loynilig úrslit

Sjálvi úrslitini fyri serstaka skúlan ella serstaka næmingin verða latin skúlunum, og verða ikki atkomulig hjá almenninginum, men skulu nýtast innanveggja til betring, bæði hjá lærarum og næmingum.

| | 2008 | 2009 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Lærugrein | 4. flokkur | 4. flokkur | 6. flokkur | 6. flokkur |
| Lesa og skilja føroyskt | 3,53 | 4,06 | 4,00 | 4,89 |
| Fyrisøgn í føroyskum | 4,93 | 4,23 | 4,78 | 4,89 |
| Málløra í føroyskum | | | 3,49 | 4,36 |
| Støddfrøði | 4,48 | 4,76 | 3,63 | 4,12 |
| Náttúra og tøkni | 4,14 | 4,44 | 2,78 | 3,81 |

*Stigini, ið verða givin á hesi talvu ganga frá 1-6, har 1 er tað lægsta og 6 tað hægsta*

# Tóku 20 bilar í 2 tímar

**Løgreglan gav 20 persónum bót í gjár fyri ymisk lógarbrot í ferðsluni í Havn. Minsta bótin var 150 krónur, men soleiðis verður ikki leingi afturat**

LØGREGLA
*Eirikur í Jákupssstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Løgreglan var og steðgaði bilum í gjár. Stutt eftir klokkan eitt vóru eini seks løgreglufólk at síggja í Havnargøtu ella røntguni í Havn.

Heili 20 bilar vórðu funnir við lógarbrotum hesar stuttu tveir tímarnar løgreglan var úti.

Mest vanliga lógarbrotið var, at fólk ikki høvdu minst til at spenna trygdarbeltið. Heili 12 fólk høvdu ikki minst til at tryggja seg ella onnur í bilinum, og tað gevur minst eina bót á 150 krónur.

Næstvanligasta brotið var at hava trupulleikar við lyktunum. Fýra vórðu steðgað fyri hetta, og bótin fyri lyktir liggur millum 150 og 250 krónur.

Annars vóru brotini fyri slitin dekk, nøkur høvdu ikki koyrikortið við og onkur hevði onkra týdningarmikla samrøðu, sum tey máttu gera í bilinum við telefonini í hondini.

- Mann kann nokk siga, at summar av bøtrunum eru láturligar, og tað verður torført at verja nakra tímaløn, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Men hetta fer eisini at broytast, tí longu 1. oktobur verða lægstu bøturnar settar upp á 500 krónur og hvørt lógarbrot verður lagt saman.



*Mest vanliga lógarbrotið var, at fólk ikki nýttu trygdarbelti, men eisini nøkur høvdu dekk, sum ikki vóru í lagi.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*